# Nú er Norðoyatunnilin veruleiki

**Fast samband um Leirvíksfjørð var heitið á kunnandi fundinum um Norðoya tunnilin, sum fyrireikingarbólkurin í Norðoyggjum skipaði fyri hóskvøldið**

NORÐOYATUNNILIN
*Solby A. Eliasen*



*0Fólk gingu runt og tosaðu um ta spennandi tíðina, sum liggur fyri framman, meðan tey nutu ein kaffimunn*

**Klaksvík:**
Umleið 150 fólk vóru til fundin. Hann byrjaði við, at býráðsskrivarin John Færø bjóðaði vælkomin og greiddi frá skránni á fundinum. Síðani spældi Klaksvíkar hornorkestur tvey løg. Onkur tók skemtandi til, at teir vórðu bodnir við at blása ígjøgnum.

Síðani tók borgarstjórin Steinbjørn Jacobsen orðið og takkaði teimum báðum gestunum, at teir vóru komnir til Klaksvíkar at kunna fólk um arbeiðið við Norðoyatunlinum. Steinbjørn kom eisini stutt inn á fyrireikingarnar, sum Klaksvíkar býur nú er farin undir í samband við komandi Norðoyatunnilin.

Stýrisbólkurin, sum er settur at fyrireika Norðoyggjar til fasta sambandið, hevur sett út í kortið nøkur øki. Tey eru millum onnur ítróttur-frítíð og mentan, skúli, fiskivinna og handilvirksemi. Ætlanin er so, at ein samskipari verður settur til at taka sær av arbeiðinum við at lýsa økini og koma við tilmælum um, hvat kann verða gjørt fyri at menna hesi øki.

– Norðoyatunnilin er nú veruleiki.

Tað vóru fyrstu orðini hjá nevndarformanninum í Norðoya tunlinum, Bergur í Garði. Hann segði eisini, at samskiftið við lokalsamfelagið er av stórum týdningi fyri arbeiðið við tunlinum. Og hann vísti á, at tað verður ein nýggj tíð fyri norðoyingar, tá fasta sambandið er komið. Síðani gav hann orðið til Dávur Reinert Hansen, stjóra í p/f Norðoyatunlinum.

## Ikki minni ferðsla

Dávur Reinert Hansen kom fyrst inn á hetta, at tað sum tað ræður um er, tíðin sum kemur eftir fasta sambandið.

– Tað ræður um tíðina, sum kemur eftir, at tunnilin er komin. Sjálvt arbeiðið upp á hann varar bara í eitt ávíst tíðarskeið, so tí ræður meira um at hugsa um eftirtíðina, segði Dávur Reinert Hansen millum annað. Hann helt ein sera áhugaverdan fyrilestur um forkanningar, fyrireikingar og arbeiðið sjálvt. Hann greiddi sera nágreiniliga frá øllum arbeiðinum og allari arbeiðsgongdini.

Eisini samanbar hann Norðoyatunnilin við Vágatunnilin til nógvar av metingunum, sum felagið hevur gjørt. Millum annað staðfesti hann, at felagið ikki væntar minni ferðslu í Norðoyatunlinum enn tað í dag er í Vágatunlinum. Tað vil siga einar 700 bilar um døgnið.

Tølini yvir akfør um Leirvíksfjørð hevur felagið frá Strandferðsluni. Tey siga, at um 15 % av ferðsluni sum fer ígjøgnum Leirvíkstunnilin fer yvir um fjørðin. Tað vil siga umleið 300 bilar um dagin. Men so eru bilar, sum standa parkeraðir á ferjuleguni í Leirvík, tí fólk ikki taka teir við yvirum.

– Tað verður spennandi at síggja, hvussu nógvir av teimum bilunum fara at koyra yvirum tá tann tíðin kemur. Sostatt kunnu vit koma við eini varligari fyribils niðurstøðu, sum sigur, at tað væntandi ikki verður minni ferðsla í Norðoyatunlinum enn í Vágatunlinum, segði Dávur Reinert Hansen.

Tá Dávur Reinert Hansen var liðugur at greiða frá, var høvi hjá fólki at seta spurningar. Tað vóru ikki so nógvir spurningar, og orðaskiftið var tí stutt. Men til dømis spurdi ein maður um møguliga kostnað at koyra yvirum. Men sum væntað, so var tað ógjørligt hjá teimum báðum at siga nakað um prís so tíðliga í verkætlanini.

Ein kona reisti seg upp og spurdi, hvar allar kvinnurnar eru í hesum høpinum.

– Eg hoyri bara allar hesar nevndirnar og bólkarnar, sum eru og skulu verða sett í sambandi við fyrireikingararbeiðið í Norðoyggjum. Men ongin kvinna er í hesum bólkunum, og tí spyrji eg bara, um tað ikki er nøkur kvinna í Norðoyggjum, sum er egnað til at sita í einum tílíkum bólki ella hvat?

Tað bleiv klappað fyri hennara fyrispurningi, og Steinbjørn Jacobsen segði, at næsti bólkurin er um at verða settur, og har verða konufólk við.

Tá orðaskiftið var av, fingu fólk ein kaffimunn og køku, og so gingu tey runt og tosaðu saman um ta spennandi tíðina, sum nú liggur fyri framman í Norðoyggjum.

Øll eru fegin um, at tunnilin nú fer at koma, og í Ósáskúlanum hetta kvøldið lat tað til, at trý ár er um heilt stutta tíð.



*Mong nýttu høvi til at tosa við stjóran í p/f Norðoyatunlinum, Dávur Reinert Hansen*



*Tá frágreiðingin hjá stjóranum var av, fingu fólk høvi til at seta teimum báðum, Dávur og Bergur, spurningar*

# Dugnalig fólk

**Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa, er ein av limunum í stýrisbólkinum, sum arbeiðir við at fyrireika Norðoyggjar til fasta sambandið. Hann lat avbera væl at fundinum og helt, at nógv vitan varð løgd á borðið**

NORÐOYATUNNILIN
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:**
– Eg eri ikki í iva um, at hetta eru sera dugnalig fólk, sum eru farin undir hesa stóru verkætlan við at knýta fleiri av norðoyggjunum upp í meginøkið, segði Eyðfinn Reyðberg. Hann sigur millum annað, at tað var hugaligt at síggja, hvussu nágreiniligar fyrireikingarnar hava verið til tunnilin. Her hugsar hann serstakliga um tíðarætlanina, sum sigur, at tað verður koyrandi um hálvt triðja til trý ár.

– Tíðarætlanin er vælgjørd, og tað hevur verðið tikið hædd fyri møguligum seinkingum eisini. Og tað er bara gott, heldur Eyðfinn Reyðberg.

Nógv hevur verið tosað um ta øktu ferðsluna, sum fer at verða í Klaksvík, tá tunnilin er komin. Men Eyðfinn heldur, at tað møguliga kann verða eitt sindur yvirdrivið. Hann vísir á, at tað koyra dagliga um 1.100 bilar út til Norðoyrar, sum liggur beint uttan fyri Klaksvík, sambært talvum, sum Dávur Reinert Hansen hevði undir sínari frágreiðing.

– Klaksvíkingar hugsa ikki um, at tað koyra so nógvir bilar út handan vegin um dagin. Tað er tí, at tað er í jøvnum streymi, og tí haldi eg, at tað tykist yvirdrivið við øllum hesum tosinum um ta øktu ferðsluna, sigur sparikassastjórin.

Dávur Reinert Hansen ásannar, at tað kanska er nakað um tað, men hann vísir á, at tað er neyðugt.

– Hetta er ein verkætlan, sum helst skal vara í mong, mong ár eftir, at hon er komin, so tað er onki at siga til, at tað verður farið fram við størsta varsemi, sigur Dávur Reinert Hansen, stjóri í p/f Norðoyatunlinum.



*Eyðfinn Reyðberg, stjóri í Norðoya Sparikassa, situr í stýrisbólkinum, sum skal fyrireika Norðoyggjar til tað fasta sambandið um Leirvíksfjørð*
*Mynd: Savnsmynd*



# Brandur í Amager Bio

**Leygardagin um eina viku, verður Brandur Enni í Amager Bio, tann 19. apríl**

KONSERT
*Ingrid Bjarnastein*



*Brandur Enni verður leygardagin um eina viku at síggja og hoyra í Amager Bio*

Guðrun Sólja er ikki einasta tvøráfólk, ið slítur sínar skógvar í Danmark í løtuni. Tað sama ger Brandur Enni, sum í løtuni er í holt við at gera PR fyri sína nýggju fløgu, sum júst er komin út í Danmark.

Brandur hevur í seinastuni verið við í fleiri sjónvarpssendingum. Bæð i hjá DR og TV2, og Bubber, sum er kendur sjónvarpsvertur í Danmark, hevur enntá kallað Brand fyri eina yngri útgávu av Ricky Martin, sum er heimskendur sangari.

Fyri stuttari tíð síðani gav Brandur fløguna »Brandur« út í Danmark. Nøkur av løgunum á fløguni hevur Óli Poulsen, framleitt, og hevur hann staðið fyri útgávum hjá nógvum mætum dønum.

Leygardagin verður so ein konsert í Amager Bio við unga tvøródreinginum. Við á konsertini verður eini íslendska Jóhanna Gúðrun, sum syngur við duett við Brandi í lagnum »Still Friends«.

# Til Aberdeen at spæla

**Sunnudagin klokkan 16 hevur Sørvágs Tónleikarfelag saman við Vestmanna Hornorkestur konsert í aulini í skúlanum á Giljanesi. Á páskum skulu tónleikararnir ferð til Aberdeen, og sunnudagin kunnu vágafólk hoyra, tað tónleikararnir fara at framføra í Skotlandi**

KONSERT
*Ingrid Bjarnastein*

**Vágar:** Í morgin, sunnudagin, verður ein konsert í auluni í skúlanum á Giljanesi. Henda konsertin verður við Sørvágs Tónleikarfelag og Vestmanna Hornorkestur.

– Vit hava vant saman í allan vetur. Byrjað varð til tunnilsupplatingina, og soleiðis hava vit hildið fram, sigur Mads K. Johannesen, sum sjálvur spælir við og er limur í nevndini hjá Sørvágs Tónleikarfelag.

Skírisdag fara allir tónleikararnir, umframt nøkur onnur, avstað til Aberdeen. Ferðaliðið telur 45 fólk.

Langa fríggjadag skulu tónleikararnir hava konsert í Inverness, og páskaaftan skal spælast til eina konsert, sum verður í sambandi við eina ellisakfarkappkoyring.

– Vit spæla vanligar marshir, sálmar, solo´ir og annað. Venjarar hjá okkum hava verið Atli K. Petersen og Steve Foggin. Á konsertini sunnudagin kemur næmingaorkestrið hjá Musikkskúlanum eisini at vera við, greiðir Mads K. Johannesen frá.

Dirigentur á konsertunum verður Steve Foggin.



*Giljanes*

# Felagskórið Gøta Leirvík og Ljómur páskakonsert

**Felagskórið Gøta-Leirvík og Ljómur úr Vági fara skírisdag at hava konsertir. Onnur verður í Christianskirkjuni undir kirkjugongdini og hin verður í Gøtu kirkju seinni um dagin**

KONSERT
*Ingrid Bjarnastein*



*Ljómur úr Vági (myndin) fer saman við Felagskórinum Gøta-Leirvík at hava páskakonsertir skírisdag. Onnur verður í Christianskirkjuni og hin verður í Gøtu Kirkju*

Ljómur úr Vági og Felagskórið Gøta-Leirvík fara skírisdag at hava páskakonsert. Fyrst verður lagt út í Klaksvík, tá sungið verður undir kirkjugongdini í Christianskirkjuni.

Nakað heilt serligt er við vitjanini hjá Ljómi í Klaksvík hesuferð, tí í ár eru tað liðin 50 ár síðani Ljómur gjørdi sínar fyrstu upptøkur. Og hesar upptøkur vóru nevniliga í Klaksvík í studio hjá Jógvan Gerðalíð.

Verkið í framført verður eitur Crucifiction eftir John Steiner, og telur kórið tilsamans umleið 40 fólk.

Fyri fýra árum síðani sang Ljómur hetta verkið, og fyri tveimum árum síðani sungu kórini bæði verkið saman. Tá vísti áhugi seg at vera fyri, at fáa verkið umsett til føroyskt, og síðani framføra tað aftur. Verkið er ikki umsett til føroyskt enn, men tó so. Nøkur brot eru, og verða tey við á konsertini.

Verkið er fyri orgul, solistar og kór. Solistarnir eru Sigmund Olsen og Hanus Debes.

Men eysturoyingar verða ikki snýttir fyri nakra konsert, tí seinni skírisdag verður ein konsert í Gøtu kirkju. Hon verður klokkan 16.

Dirigenturin, Dorte Tilmar, og organisturin Christian Tilmar, eru komin til Føroya júst til hesa konsertina, og verður tí eisini møguleiki at geva eina gávu fyri at stuðla.

# Felags konsert fyri Vestmanna og Vágakórið

**Skírisdag verða tvær páskakonsertir í ávíkavist Vestmanna og Miðvági. Luttakandi kór eru Vágakórið og Vestmanna sangkór. Hesi bæði kórini hava síðani jól vant saman, og eru konsertirnar úrslit av regluligu venjingunum**

KONSERT
*Ingrid Bjarnastein*

Síðani tunnilin er komin hevur tað ligið væl fyri hjá Vestmanna sangkóri og Vágakórinum at vant saman.

– Síðani jól hava vit vant fast saman einaferð um vikuna. Hetta hevur jú verið ómøguligt fyrr, og hetta hevur eisini eydnast serstakliga væl, sigur Hans Pauli Strøm, formaður í Vestmanna sangkóri.

Kórini telja hvør í sær eitt sindur yvir 20 fólk, so saman verða yvir 40 fólk, sum koma at syngja skírisdag.

– Eitt slíkt kór gevur størri møguleikar at framføra størri verk, heldur Hans Pauli Strøm. Hann leggur afturat, at hetta hevur verið eitt royndarumfar, sum hevur ginið ógvuliga væl.

Av tí, at tíðin hevur verið knøpp at venja í, so verða brot framførd úr tveimum verkum. Annað er Missa Brevis eftir W.A. Mozart og hitt eitur Requiem eftir Gabriel Fauré. Eisini verða nakrir páskasálmar á skránni.

Kórleiðari er Kári Bæk og hjálparleiðari er Steve Foggin. Kári Bæk stjórnar vanliga Vestmanna sangkóri, og Steve Foggin Vágakórinum. Verkini eru til orkestur, men orkestur verða tó ikki við í framførsluni hesuferð. Helga Garðalíð fer ístaðin at syrgja fyri orgulfylgispæli. Konsertirnar vera tvær í tali, og báðar vera skírisdag. Onnur verður í Miðvágs kirkju klokkan 15, og hin verður í Vestmanna kirkju klokkan 19.



*Tvær páskakonsertir verða skírisdag við Vestmanna sangkóri og Vágakórinum. Onnur verður í Vestmanna kirkju (myndin) og hin verður í Miðvágskirkju*